## Íløgur uttan váða

Norðoya Sparikassi bjóðar nú kundum sínum at gera íløgur í partabrøv uttan váða fyri kurstapi. Sparikassin sigur, at hóast trýst á marknaðinum, so hava stóru fyritøkurnar kortini megnað at givið kursvinning, og tí bjóðar Norðoya Sparikassi fólki at seta pening inn á eina innlánskonto og fáa kursvinningin á seks norðurlendskum partabrøvum eftir trimum árum. Sparikassin hevur valt út Nokia, Statoil, H&M, AstraZeneca, A.P. Møller Mærsk og Danske Bank. Norðoya Sparikassi fer at kunna um møgulekarnar í Miðlon 9., 10. og 11. september klokkan 19.00 til 21.00.




# sjey mánaðum



*Setanarbræv og blómur til nýggja mentamálaráðharran, Óluvu Klettskarð. Hon ætlar at fylgja í sporunum, sum undangongukvinnan hevur slóðað, og væntar sær eitt gott samstarv í Tinganesi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

hevði verið í tinginum.

- Eg eri ikki tann mest snakksaligi í tinginum, men fríggjakvøldið fekk eg so høvið at tosa við teg í telefon, fyri at kanna eftir, at eingi lík vóru í lastini. Og eg má siga, at í teirri stuttu samrøðu okkara millum fekk eg tað inntrykk, at tú hevur ein sera sterkan integritet, segði løgmaður.

### Fakligan førleika

Hann nam síðani við fakliga førleikan hjá Óluvu Klettskarð og tann veruleika, at hon kemur av bygd, úr Haraldsundi.

- Eg veit ikki hví mamma tín ikki nevndi tað, tá eg heilsaði upp á familjuna, at hon er ættað úr Porkeri, og tað dregur í hvussu er ikki niður, helt løgmaður skemtandi fyri.

Hann dugdi illa at koma við góðum ráðum um, hvussu Óluva Klettskarð skuldi røkja uppgávuna, men ein góður fakligur førleika er ikki at kimsa at.

- Men tað týdningarmesta er, at mann hevur sína sunnu fornuft við sær í øllum viðurskiftum, sum mann hevur við at gera, segði løgmaður.

Hann ynskti síðani Óluvu Klettskarð góða eydnu í starvinum og vísti á, at talan er um eitt ógvuliga krevjandi starv, tí ein skal hava í huga, at útbúgving og mentan eru partar av kjarnuøkjunum í okkara samfelag, og sum eisini hava fingið eina høga raðfesting í tí samgonguskjali, sum er politiski setningurin.

- So tað er ein stór ábyrgd, sum verður løgd á tínar herðar, og eitt, sum hevur stóran týdning, er, at familjan, sum er her í dag, eisini veit tað, at tað er ógvuliga týdningarmikið, at mann hevur eina trygga og robusta familju við sær í arbeiðinum, tí familjan er jú tað frístaðið, sum mann hevur brúk fyri. Og tað er har, mann løður battaríini, fyri at fara út aftur at kempa víðari við teimum málum, mann hevur, segði løgmaður.

Við blómum og setarbrævið ynskti løgmeður síðani Óluvu Klettskarð eina hepna hond í starvinum sum mentamálaráðharri.

### Nýggjan stól

Nýggi mentamálaráðharrin takkaði løgmanni fyri tey vøkru orð, hann hevði til hennara.

- Eg vænti og vóni, ja eg veit, at vit fara at fáa eitt gott samstarv. Eg fari eisini at takka Kristinu Háfoss fyri tað stóra arbeiði, hon hevur framt í ráðnum, og fyri gott samstarv okkara millum, segði Óluva Klettskarð.

Hon vissaði um, at tær báðar fara at gera hesa yvirgongdina so smidliga sum gjørligt, og hon hevur boðað frá, at hon fer at ganga í teimum fótasporum, sum Kristina Háfoss hevur slóðað.

- Okkara samstarv hevur verið sera gott, og eg fari at takka tær og ynskja tær alt tað besta. Somuleiðis fari eg at takka flokkinum fyri ta stóru ábyrgd, mær er sýnd, segði Óluva Klettskarð.

Hon nam síðani við stóra gjøgnumtrekkin av mentamálaráðharrum, sum Tjóðveldi hevði havt seinastu árini í samgongu.

- Sessurin hevur verið ógvuliga ringur at siti í, so eg havi fingið eini góð ráð, og tað er at skifta stólin út beinanvegin, segði Óluva Klettskarð at enda.